

Hans Andrias Sølvará, søgufrøðingur:
– Fólksins lógir, ið eru skaptar gjøgnum kjak og grundgevingar, skulu galda í Føroyum

fyri 100 árum síðan, leggur skjótt til merkis, at støðið var rættiliga høgt. Har eru drúgvar og væl skrivaðar politiskar heilsíðugreinir uttan myndir, sum nógvir avíslesarar í dag ikki høvdu tímað at tugt seg ígjøgnum. Har eru eisini drúgvar greinir um átrúnað, sum eru á einum nógv hægri støði enn nógv av tí, sum stendur í bløðunum í dag. Ofta eru tað tey somu, tann samfelagsliga elitan, eitt nú prestar og politikarar, sum skriva. Vanlig fólk tóku ikki so virkið lut í almenna kjakinum, sum tey gera í dag. Eg veit ikki, um kjakmentanin er framkomnari í dag, enn hon var fyri 50-60 árum síðan. Nógv fleiri vánalig kjakinnlegg eru í bløðunum í dag, enn tað vóru fyri 50-60 árum síðan, men fleiri góð eru eisini.

## Gongur tað framá í føroyskum politikki?

Tað hevði eg ynskt, men eg noyðist tíverri at svara, at mín kensla er, at tað ongantíð hevur verið so lítið skil á sum nú. Kanska er tað bara eg, sum eri broyttur, men eg havi ilt við at góðtaka, at politiska skipanin ikki er før fyri at raðfesta nøkur ár fram. Tað tykist ikki, sum politiska skipanin er før fyri at seta loysnir inn í eina samfelagsliga heild. Talan er fyri tað mesta um ad hoc-loysnir.

## Hvat er týdningarmesta málið í føroyskum politikki?

Tann stóri trupulleikin í føroyskum politikki er, at vit hava ein óavgreiddan spurning, sum snýr seg um viðurskifti Føroya við Danmark. Hann skuggar ofta fyri øllum øðrum samfelagsligum trupulleikum. Hesin trupulleikin hevur við sær, at vit fáa ikki loyst aðrar átrokandi spurningar. Tað avgerandi er ikki, hvussu hesin trupulleikin verður loystur, men at hann í breiðari semju verður loystur, so politiska skipanin kann brúka orkuna upp á onnur átrokandi samfelagsmál. Tí hevði tað verið stórt spell, um stjórnarskipanin, sum kundi lagt lok á spurningin í nøkur ár, fór fyri bakka.

## Tú hevur sett spurnartekn við trúvirðið í nógvum av tí, sum Bíblian sigur. Hví tað?

Eg eri ein kristin agnostikari, sum helli til eina eksistentiella tilverufatan, har einstaklingurin er í miðdeplinum, og spurningar kunnu setast við allar metafysiskar skipanir. Nietzsche segði, at menniskjan skilir seg frá djórunum á tann hátt, at hon megnar at lúgva fyri sær sjálvari. Menniskju kunnu stremba eftir at fáa vald yvir øðrum menniskjum, men fjala sína valdsgirnd handan føgur orð um moral, tað heilaga ella Guð. Eg havi trupult við at góðtaka aldargamlar útleggingar av tilveruni, sum byggja á heilagar tekstir, serliga tá tær verða brúktar politiskt og trýstar oman yvir fólk, sum hava aðrar tilverutulkingar. Hetta síggja vit framvegis í Føroyum, tá politikarar tosa um, at í Føroyum skulu Guðs lógir galda. Eg eri ósamdur. Fólksins lógir, ið eru skaptar gjøgnum kjak og grundgevingar, skulu galda í Føroyum.

## Hví heldur tú, at Jesus fekk so stóran týdning?

Vit vita ógvuliga lítið um Jesus, keldurnar eru fáar, ósemjurnar millum granskarar eru óteljandi, men teir eru samdir um, at Jesus var jøði. Onkur granskari hevur roknað út, at taka vit teir 40 dagarnar í oyðimørkini úr evangeliunum, siga tey bara frá umleið trimum vikum í 30 ára langa lívinum hjá Jesusi. Sjálvur hevur Jesus einki skrivað. Trupult er tí at gera av, um Paulus og evangelistarnir ella Jesus hava skapt kristindómin. Vit høvdu nærum einki vitað um Jesus uttan Paulus og evangelistarnar. Ein annar persónur, sum hevur havt stóran týdning, er Sokrates, sum livdi 400 ár undan Jesusi og eisini varð dømdur til deyða fyri at hava spottað Guð. Alt tað, sum vit vita um hann, vita vit gjøgnum næming hansara, Platon. Gudfrøðingurin John Hick heldur, at tað er júst kring persónar, sum vit vita lítið um, at mytur, ið fáa ein ævigan boðskap, kunnu skapast. Jesus skapti ikki einsamallur kristindómin. Evangelistarnir løgdu lívssøgu Jesusar til rættis við støði í egnum gudfrøðiligum sjónarmiðum, men tað broytir ikki tann veruleika, at milliónir av fólki hava tikið kærleiksboðskapin í Bíbliuni til sín.

## Eru føroyingar meira átrúnaðarligir enn onnur fólk?

Tað veit eg ikki, men av tí, at føroyingar í øldir hava livað eitt vandamikið dagligt lív tætt at tí máttmiklu náttúruni, sum breyðføddi teir, bera føroyingar helst við sær ein søguligan arv, sum hevur givið teimum eitt meira inniligt og óttafult samband við tað guddómliga enn summi onnur fólk. Serliga tá menniskju standa andlits til andlits við deyðan, gerast spurningar um Guð og ævinleikan átrokandi. Tá eg síggi lesarabrøv, sum ikki gera annað enn at endurgeva Bíbliuna, kann eg tó fáa ta fatan, at støðið innan átrúnaðin í Føroyum í dag ikki er so høgt allastaðni.

## Heldur tú, at átrúnaður er ein forðing fyri skynsemi?

Ja, átrúnaður kann vera ein forðing fyri skynsemi. Við einum ávísum rætti hevur verið sagt, at tann arabiska mentanin í Miðeystri, sum í miðøldini bæði tøkniliga, heimspekiliga og vísindaliga var á einum nógv hægri støði enn tann evropeiska, fór fyri bakka orsakað av átrúnaðarligum trongskygni eftir umleið 1500. Á sama hátt kann hugsast, at tað trongskygda og vísindafíggindaliga rákið innan kristindómin, sum eisini er komið higar úr USA, fer at forkoma tí framkomnu vesturlendsku mentanini. Fara vit aftur til eina skipan, har persónligir trúarspurningar skulu leggja forðingar í vegin fyri vísindini, er vandi á ferð. Við hesum sigi eg ikki, at allur átrúnaður forðar fyri skynsemi, tí tað ger hann ikki.

## Hvør er tín dreymur fyri Føroyar?

At Føroyar verða eitt samfelag, har mentanarligt og menniskjaligt fjølbroytni verður mett at vera ein dygd, sum styrkir samfelagið, og ikki nakað, sum spillir føroyska mentan. Tað er kanska ov nógv at krevja av menniskjum, at tey skulu elska sínar fíggindar, men hetta havi eg so lisið onkustaðni.

## Hvørjar eru tríggjar tær størstu persónmenskurnar í heimssøguni?

Hetta er ein trupul spurningur, sum ikki kann svarast seriøst. Søgubøkurnar eru fullar av mannligum politikarum, sum hava sett síni spor í heimssøguna, men man tað ikki lutvíst vera tí, at menn hava skrivað tær flestu søgubøkurnar, og at tær snúgva seg um politiska søgu? Tosa vit um originalitet og týdning, má eg nevna Kopernikus, Kant og Darwin, sum hvør í sínum lagi løgdu lunnar undir modernitetin og tað sekulera vesturlendska samfelagið grundað á upplýsta heimspeki, mannarættindi og vísindi.

## Hvat er eitt eydnuríkt lív?

Eydnan er ikki ein støða, sum menniskju áhaldandi kunnu vera í gjøgnum lívið. Menniskju kunnu bara uppliva eydnuna í løtum, t.d. tá tey eru um at náa ella ákkurat hava nátt einum máli. Tann, sum verður standandi á málinum, har hann hevur funnið eydnuna, missir hana. Eitt eydnuríkt lív er at hava fólk rundan um seg, sum eru góð við ein, og at liva eitt lív, har tú heldur enn at seta krøv til onnur menniskju hevur yvirskot at góðtaka tað, sum er øðrvísi, og altíð at vera á veg.